STARVSLÝSING




FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

## Mikrobiologur til mikrobiologisku kanningarstovuna

Søkt verður eftir mikrobiologi til mikrobiologisku kanningarstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Talan er um eitt nýtt starv. Mikrobiologurin skal standa fyri menning av kanningarhættum á kanningarstovuni, soleiðis at vit støðugt eru á høgum fakligum og tøkniligum støði.

Høvuðsuppgávurnar eru:

- Saman við deildarleiðaranum at hava
  - Virknan lut í fakligari menning av deildini
  - Virknan lut í góðskustýringini, herundir eisini statistiskar útrokningar
- At vátta akkrediteraðar svarseðlar
- At luttaka í verkætlanum innan mikrobiologiska økið
- At gera mikrobiologiskar kanningar av mati, fóðuri, drekkivatni og øðrum
- Aðrar uppgávur á deildini

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava útbúgving sum B.Sc. í lívfrøði ella líknandi, harumframt hollan kunnleika til kanningarstovuarbeiði og helst hava laborantútbúgving áðrenn B.Sc. prógvið.

Harumframt krevst koyrikort til bil og kunnleiki til EDV á meira enn brúkarastøði.

Royndir frá kanningarstovuarbeiði innan vanligar mikrobiologiskar kanningar er ein fyrimunur. Somuleiðis eru leiðsluroyndir og royndir við góðskustýring ein fyrimunur.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Sum persónur væntað vit, at tú ert nærlagdur/nærløgd og hevur áræði og framfýsni at náa settum málum. At tú sært nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugur væl at samstarva, og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð. Talan er um fast starv har setanin byrjar 1. oktober 2007, ella sum skjótast eftir hetta.

Lønin verður á stig 1 eftir sáttmálanum hjá Magistarafelag Føroya.
Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsókn til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 22. august 2007.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Birnu Mørkøre, deildarleiðara.

## Yvirlaborantur til mikrobiologisku kanningarstovuna

Søkt verður eftir yvirlaboranti til mikrobiologisku kanningarstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Yvirlaboranturin stendur fyri dagliga rakstrinum av kanningarstovuni og ger eisini mikrobiologiskar kanningar.

Uppgávurnar eru m.a.:

- At planleggja uppgávurnar fyri vikuna herundir eisini hvussu arbeiðið verður skipað
- At gera mikrobiologiskar kanningar av mati, fóðuri, drekkivatni og øðrum
- At vátta akkrediteraðar svarseðlar
- Samskifti við kundar
- At hava ábyrgd av bílegginging av vørum
- O.a. arbeiði sum hoyrur kanningarstovuni til.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur og við relevantari víðariútbúgving sum laboratoriuteknikari ella líknandi.

Hollur kunnleiki til vanligar EDV skipanir sum heild er eitt krav og áhugi at tú hevur hug at arbeiða við og menna fak EDV skipanir.

Harumframt krevst koyrikort til bil.

Royndir frá kanningarstovuarbeiði innan vanligar mikrobiologiskar kanningar er ein fyrimunur. Somuleiðis eru leiðsluroyndir og royndir við góðskustýring ein fyrimunur.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Sum persónur væntað vit, at tú ert nærlagdur/nærløgd og hevur áræði og framfýsni at náa settum málum. At tú sært nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugur væl at samstarva, og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð. Talan er um fast starv har setanin byrjar 1. oktober 2007, ella sum skjótast eftir hetta.

Lønin verður í 5. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsókn til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 22. august 2007.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Birnu Mørkøre, deildarleiðara.

**Stovnurin**
Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at gera lógarásett eftirlit og starvsstovukanningar innan matvøru-, veteriner- og umhvørvisøkið og at fremja gransking og menning við tilknýti til hesi øki.

Á mikrobiologisku kanningarstovuni eru tilsamans 10 fólk. Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK. Sí nærri upplýsingar á www.hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

VASTI 459010